# Nýggj skelti skulu avmarka ferðina

**Tíðindafundur var kl. 10 í morgun í Gøtu skúla í samband við, at broytilig elektronisk skelti vóru tendrað í Gøtu. Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki byrjaði við at bjóða vælkomin og segði nøkur orð, meðan fundarluttakarnir fingu sær morgunmat**

FERÐSLA
*Heini S. Kristiansen*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Skúlabørn í 5. flokki í Gøtu skúla fegnast um tann trygga skúalvegin*

Eftir morgunmatin, kom umboð fyri Landsverk upp og greiddi frá verkætlanini "ferðtálmandi tiltøk".

Gunn H. Møller, prosjektleiðari byrjaði við, at greiða frá, hvussu ein trupulleiki verður staðfestur.

Landsverk ger kanningar ymsastaðni kring landið, og tað er eisini møguleiki at siga frá, um tú metir at eitt vegastrekkið er serliga vandamikið. Ofta eru tað skúlarnir, sum boðað frá, at tað ikki er nøktandi við ferðslutrygdina á einum ávísum øki.

Tá ið trupulleikin verður staðfestur, verður greinað, hvørji tiltøk kunnu setast í verk, fyri at gera ferðsluna tryggari.


*Gunn H. Møller, prosjektleiðari*

### Ferðin minkar

Tað er staðfest, at ferðin er ov høg í ávísum økjum. Landsverk ætlar at seta upp ferðgáar (skelti, sum vísa bilføraranum, hvussu skjótt hann koyrir) og broytilig skelti, sum hava eina fleksibla hágmarksferð. Hetta skal ætlandi minka um miðalferðina, har ið tey verða sett upp. Ferðgáar eru settir upp í Skipanesi og í Sandavági.

Kanningar úr Danmark vísa, at miðalferðin minkar 5-8 km/t tað fyrsta árið, eftir at ferðgáar eru settir upp. Landsverk hevur gjørt kanningar av ferðini í Sandavági áðrenn og aftaná, at ferðgáin varð settur upp.

Áðrenn ferðgáin varð settur upp, koyrdu einans 21% undir loyvdu hámarksferðini. Tá ið ferðgáin var settur upp, koyrdu 34% undir markinum.

Broytilig skelti er eitt elektroniskt skelti, sum kann tendrast og sløkkjast. Tað er møguleiki fyri at broyta hágmarksferðina, og ætlanin er, einans at hava tað tendrað, tá ið børn eru á vegnum. Hugskotið er, at tey einans skulu lýsa, ta ið tað er neyðugt, fyri at tey skulu fáa ynskta úrslitið.

### Tendrað ávís tíðarskeið

Ætlanin er eisini at innføra stigvísa ferðminking áðrenn bygt øki. Frá at koyra 80 km/t verður ferðin fyrst sett niður til 60 km/t og síðani til 50 km/t. Skeltini skulu setast upp báðumegin vegin, so at skeltið sæst betri.

Mastrarnar, sum skeltini standa á, eru eisini tryggari, tí at tær geva seg, um ein bilførari rennur á skeltið. Skeltið fer afturav og koppar ikki omanyvir bilin.

Skeltið í Gøtu verður tendrað ávís tíðarskeið millum kl 7.50 til 14.30 hvønn gerandisdag. Skeltini verða passað eftir tímatalvuni hjá skúlanum.

Hetta er ein nógv bíligari loysn enn forðingar, sum t.d. vegbungur og oyggjar. Ferðgáarnir kosta 70.000 kr. stk. Tey broytiligu skeltini kosta 150.000 kr. stk.

Skeltini vóru tikin í nýtslu í dag. Kanningar verða gjørdar ½ ár og 1½ ár eftir, um skeltini gera nakran mun. Eisini verða spurnarbløð givin út til foreldur og børn um 1½ ár.

Vit vóna, at hesi skeltini fara at gera tað tryggari hjá børnunum at koma í skúla, sigur Gunn H. Møller.

## Nú kann økið til grundøkini keypast

**Norðskáli:** Sum væntað samtykti bygdaráðið í Sunda kommunu einmælt eitt uppskot um játtan at keypa eitt øki í kommununi.

Á bygdaráðsfundi mánakvøldið varð nevniliga samtykt, at keypa eitt øki til hetta endamálið fyri 4 mió kr.

Tekniska nevnd hevði annars mælt til, at so skjótt sum kommunan hevði ognað sær hetta økið frá Búnaðarstovuni, at fara víðari í prosjekteringini og við at bjóða arbeiðið út.

Sum skilst er stórur byggiáhugi í kommununi. Og hjá kommununi liggja í dag fleiri umsóknir um byggiloyvi.

**sb.**

## Ungdómsstevnan longu fullteknað



**Giljanes:** Hóast langt er til freistin at tekna seg til Landsungdómsstevnuna hjá Heimamissiónini er úti, er longu greitt, at stevnan verður fullteknað.

Fyrireikararnir boða frá, at higartil hava 350 ungfólk úr øllum landinum boðað frá luttøku, og hetta er samstundis ovasta mark fyri talinum av luttakarum.

– Men møguleiki er kortini at seta seg á bíðilista, sigur ungdómsráðgevin hjá Heimamissiónini, Hans Kristian Justesen.

Landsungdómsstevnan verður í døgunum 11. til 14. mai, og plagar altíð at savna hundraðtals ungfólk úr øllum landinum. Og soleiðis verður eisini í ár.

**sb.**

*Ræatting:*

## Ikki 60 – men 60 %!

**Gøtunøvn:** Tað ljóðaði helst ógvusligt í eygunum á mongum lesara í gjár, tá vit bóru tíðindi um at 60 av postbygdunum í Føroyum ikki høvdu gøtunøvn.

Tíverri var eitt týdningarmikið tekin dottið úr greinini - %: Talan var ikki um 60 postbygdir, men um 60 % av postbygdunum í Føroyum.

Hetta kastar uttan iva rætt ljós yvir henda veruleikan!

**sb.**